# Broytingar í útbúgvingini sum skipsatstøðari

Tilmæli

25. juni 2024

# Innihaldsyvirlit

Inngangur....2
Forsøga og avbjóðing....3
Arbeiðssetngingur....5
Arbeiðsgongd....5
Tilmæli....6
Tilmælið í mun til altjóða krøv....6
Uppskot til bygnað av útbúgving sum dekkari og skipsatstøðari....9
Fráðgreiðing um bygnaðin....10
Førleikameting og modulbygnaðurin....11
Kunngerðarbroytingar....12
Kostnaðarmeting....13
Fylgiskjøl....14
Fylgiskjal 1....14
Fylgiskjal 2....15

## Inngangur

Landsstýrismaðurin í Barna- og Útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, setti í oktober 2023 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til broytingar í útbúgvingini sum skipsatstøðari, sum hevur til endamáls at endurskoða verandi útbúgving sum skipsatstøðari og snikka saman ein styttri útbúgvingarleist fyri tey, sum skulu starvast sum fulltikin dekkari burturav. Ynskið var eisini at snikka saman styttri leist fyri sjófólk við royndum og tey við yrkisútbúgving, so at hesi kunnu fáa prógv sum fulltikin dekkari uppá styttri tíð. Samstundis skuldi innihaldið á útbúgvingini endurskoðast í mun til endamálið við útbúgvingini. Tað vil siga, er endamálið at útbúgva dekkarar, skiparar, annað og hvat skal broytast í núverandi útbúgving í mun til endamálið?

Landsstýrismaðurin mannaði arbeiðsbólkin við seks fólkum sum umboða økið.

- Umboð fyri Sjóvinnustýrið (Anly Sandberg Petersen)
- Umboð fyri Fiskimannafelagið (Jan Højgaard)
- Umboð fyri Sjónám (Brandur í Funningsstovu)
- Umboð fyri vinna/ Reiðarafelagið fyri handilsskip (Jórun Gardar, Vinnuhúsið)
- Umboð fyri Undirvísingarstýrið (Rúni Arge Mortensen)
- Umboð fyri Barna- og Útbúgvingarmálaráðið (Janus á Ryggi)

## Forsøga og avbjóðing

Í løtuni er útbúgvingin sum skipsatstøðari samansett av einum grundskeiði í heysthálvuni (Kunngerð nr. 88 frá 4. august 2014 um grundskeið í útbúgving til skipsatstøðara) og einum endaskeiði í várhálvuni (Kunngerð nr. 121 frá 11. november 2015 um endaskeið í útbúgving til skipsatstøðara).
Frá summri 2021 hava hesi bæði skeið verið koyrd saman í eitt ára gongd við próvtøku á summri. Fyrimyndin fyri føroysku útbúgvingina sum skipsatstøðari er danska útbúgvingin, "skibsassistent". Tó er ikki júst sama praksis í mun til mannagongdir í mun til útbúgvingina. Til dømis kunnu persónar við eini viðkomandi yrkisútbúgving í Danmark taka "skibsassistent" uppá 3 mánaðir (https://www.retsinformation.dk/eli/lta/2016/1586). Í Danmark er útbúgvingin eisini enn býtt upp í eitt grundskeið við eini próvtøku og einum endaskeið við eini próvtøku. Roynd sjófólk kunnu fáa meting og "kvalifikationsbevis som ubefaren skibsassistent" og sleppa tá undan einum hálvum ári á skúlabonki. Prógvið kann eisini brúkast til at mynstra sum "ubefaren skibsassistent". "Ubefaren skibsassitent" verður í Føroyum nevnt "ófulltikin dekkari". Samanborið við í Danmark, hava vit í Føroyum tó ikki eitt serligt útbúgvingarkrav fyri at kunna sigla í starvi sum ófulltikin dekkari.

Ymiskar avbjóðingar eru í løtuni í mun til útbúgvingina sum skipsatstøðari. Vinnan, felagið fyri Handilsskip, Vinnuhúsið og Sjóvinnustýrið hava víst á, at stórt trot er á føroyskum, fulltiknum dekkarum til handilsskip. Nakrar av orsøkunum til hesa støðu eru:

- Síðani 1. januar 2017 hevur verið krav um, at fulltiknir dekkarar á handilsskipum til støddar omanfyri 500 BT skulu hava førleikaprógv sum fulltikin dekkari. Fyri at fáa hetta førleikaprógvið krevst m.a. útbúgving sum skipsastøðari (sí kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum, sum broytt við kunngerð nr. 133 frá 21. september 2017, fylgiskjal 1).
- Ein yvirgangstíð var fyri dekkarar við royndum, tá kunngerðin kom í gildi í 2015, so at sjófólk við drúgvum royndum sum dekkarar fram til 1. januar 2017 kundu fáa førleikaprógv sum fulltikin dekkari grundað á royndinar, og sluppu harvið undan kravinum um at hava útbúgving sum skipsatstøðari. Yvirgangstíðin var fram til 1. januar 2017 og øll sjófólk, sum søktu eftir hetta, skuldu liva upp til herda kravið um at hava útbúgving sum skipsatstøðari, so at tey í dag mugu undir 1 ára skúlagongd, um tey ynskja at mynstra sum fulltikin dekkari við handilsskipi til støddar omanfyri 500 BT. Omanfyrinevndu reglur um førleikaprógv til fulltiknan dekkara á handilsskipum omanfyri 500 BT byggja á krøvini í altjóða STCW-sáttmálanum. Sambært Sjóvinnustýrinum ber ikki til at longja freistina fyri yvirgangstíðini vegna krøvini í STCW-sáttmálanum.

- Í løtuni tekur tað 1 ár at taka útbúgvingina sum skipsatstøðari. Hetta merkir til dømis, at sjófólk við 20 ára royndum frá fiskiskipum skulu á skúlabonk í eitt ár fyri at fáa prógv sum skipsatstøðarar fyri síðani at kunna søkja um eitt førleikaprógv sum fulltikin dekkari, til tess at kunna starvast sum fulltikin dekkari umborð á handilsskipum til støddar omanfyri 500 BT.
- Samstundis tykist tað sum at fá av teimum, sum hava tikið skipsatstøðara á Sjónámi í Klaksvík fara víðari at arbeiða í vinnuni sum dekkarar. Útbúgvingin verður heldur brúkt sum lopfjøl til at fara inn á skiparaútbúgvingina o.a.

Undirvísingarstýrið hevur umrøtt avbjóðingina við Sjónám, men júst, hvussu útbúgvingin skal snikkast saman, broytast og námsskipanin skal vera, er neyðugt at umrøða nærri.

Samstundis hevur Undirvísingastýrið saman við Sjónámi síðani á vári 2023 gjørt mannagongd fyri førleikameting, so at sjófjólk við viðkomandi royndum, kunnu koma ígjøgnum skipsatstøðaraútbúgvingina uppá styttri tíð ella fáa prógv sum skipsatstøðarar, um tey lúka krøvini. Neyðugt er tó at arbeiða víðari við, hvussu metast skal um arbeiðsroyndir, skráseta royndir t.d. í útbúgvingarbók og gera ein útbúgvingarleist, sum riggar til førleikametingarleistin.
Ofta verður hugt til grannalondini fyri at finna góð dømi um útbúgvingar, námsskipanir o.a. Men trupult er í hesum førinum at finna nakað dømi uppá eitt styttri skúlaskeið til dekkara, sum minnir um og kann brúkast í Føroyum úr okkara grannalondum.
Ynskið var tí, at seta ein skjótt arbeiðandi arbeiðsbólk at koma við einum tilmæli til loysnir í hesum máli.

## Arbeiðssetngingur

Landsstýrismaðurin hevur avgjørt at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til ítøkiligar tillagingar í útbúgvingini sum skipsatstøðari, sum hava til endamáls at snikka saman ein styttri útbúgvingarleist fyri tey, sum ynskja at vera dekkarar og endurskoða innihaldið á skipsatstøðara útbúgvingini í mun til endamálið við útbúgvingini.

Arbeiðssetningurin er hesin:

- Snikka saman ein styttri útbúgvingarleist fyri tey, sum ynskja at vera dekkarar.
- Endurskoða verandi útbúgving sum skipsatstøðari.
- Snikka saman styttri skeið fyri sjófólk við royndum og tey við yrkisútbúgvingum, so at hesi kunnu fáa prógv sum dekkarar ella sum skipsatstøðarir uppá styttri tíð.
- Endurskoða innihaldið á útbúgvingini í mun til endamálið við útbúgvingini. T.v.s. er endamálið at útbúgva dekkarar, skiparar, annað og hvat skal broytast í núverandi útbúgving í mun til endamálið?

## Arbeiðsgongd

Fyrst var tíðin brúkt at avklára, hvør avbjóðingin er, viðgera arbeiðssetningin, og hvørjar møguligar loysnir kundi vera. Bólkurin var samdur um, hvat kundi gerast, og tí var avtalað, at fara undir arbeiðið við at tillaga útbúgvingina saman við lærarum á Sjónámi. Arbeiðið snúði seg serliga um at finna út av, hvussu eitt styttri skeið kann skipast til fulltiknar dekkarar, hvat innihaldið skal vera, hvørjar kunngerðir skulu broytast og hvussu ein møguligur útbúgvingarleistur kundi snikkast saman.

Tilmælið tekur støðið í verandi námsskipan, altjóða STCW krøvum, dømum úr øðrum londum, tørvinum í vinnuni og ynskinum um at støðugt hava eina útbúgving á høgum støði.
Aftaná at hetta arbeiðið var gjørt, viðgjørdi bólkurin tilmælið, og øll komu við sínum viðmerkingum, áðrenn endaliga tilmælið var latið úr hondum.

## Tilmæli

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við at finna út av, hvussu ein styttri útbúgvingarleistur fylgir altjóða krøvum og hvørjar broytingar tá eru neyðugar í verandi kunngerðum. Nýtt skema og faktillaging er gjørd. Loysnin er at umskipa útbúgvingina í modulir, har øll fakini, sum skulu til fyri at fáa útbúgving sum fulltikin dekkari, eru fyri seg og síðan restina av fakunum í mun til útbúgvingina sum skipsatstøðari eru fyri seg. Á hendan hátt verður møguligt at koma skjótari í gjøgnum útbúgvingina sum fulltikin dekkari, lættari at førleikameta, og ein størri málbólkur fær tá vónandi eisini gagn og gleði av útbúgvingini.

## Tilmælið í mun til altjóða krøv

Flestu útbúgvingar innan maritima økið skulu liva upp til altjóða krøv ásett í STCW konventiónini (Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Seafarers). Hetta til tess, at tær kunnu verða grundarlagið undir at útskriva ávikavist sjóvinnubrøv ella førleikaprógv, sum umborð á skipunum eru skjalprógvini fyri nøktandi førleikar.
Innleiðandi verður tí víst á, hvussu verandi útbúgving sum skipsatstøðari (grund- og endaskeið) eru í mun til STCW krøvini, og hvussu ein loysn kann vera á arbeiðssetninginum út frá altjóða krøvum.

Útbúgvingin sum skipsatstøðari gevur í dag fakligar førleikar, sum kunnu geva rættindi til at fáa hesi førleikaprógv:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Førleikaprógv sum fulltikin skipsatstøðari | STCW reg. II/5 og STCW reg. III/5 |
| 2. | Førleikaprógv sum fulltikin dekkari: | STCW reg. II/5 (Able seafarer deck) |
| 3. | Førleikaprógv sum fulltikin motormaður: | STCW reg. III/5 (Able seafarer engine) |
| 4. | Vaktarhaldsprógv, brúgvatænastu: | STCW reg. II/4 |
| 5. | Vaktarhaldsprógv, maskintænastu: | STCW reg. III/4 |
| 6. | Basic training: | STCW A-VI/1, grein 2 um Basic Training |

Fyri at fáa nevndu førleikaprógv krevst, umframt útbúgvingina sum skipsatstøðari m.a. eisini siglingartíð.

Á flóðkortinum niðanfyri er yvirlit yvir ymisku førleikaprógvini við STCW-átekingum, umframt upplýsingar um, hvar førleikaprógvini kunnu nýtast.

**<u>Flóðkort: Førleikaprógv</u>**




Á yvirlitinum omanfyri sæst, at útbúgvingin sum skipsatstøðari er samansett av fleiri pørtum av STCW-sáttmálanum. Tað er munur á, hvussu ávísingarnar eru til STCW-sáttmálan, alt eftir um talan er um eitt sjóvinnubræv ella førleikaprógv, ella um talan er um eina útbúgving, sum skal lúka krøvini til at kunna vera grundarlagið undir at skriva út eitt sjóvinnubræv ella førleikaprógv.

Tá ið talan er um sjóvinnubrøv ella førleikaprógv verður ávísining til STCW-sáttmálin gjørd til *regulation*, t.d. STCW **reg. II/5**, meðan tá ið talan er um eina útbúgving, sum skal lúka krøvini til at

fáa eitt sjóvinnubræv ella førleikaprógv verður ávísingin til STCW-sáttmálin gjørd til *section* í STCW koduni, t.d. STCW **sec. A-II/5**.

Sum sæst á flóðkort yvirlitinum, gevur útbúgvingin sum skipsatstøðari rættindi at fáa millum annað eitt førleikaprógv sum skipsatstøðari. Førleikaprógv sum fulltikin skipsatstøðari er ein samanseting av førleikapróvnum sum fulltikin dekkari, STCW reg. II/5, og fulltikin motormaður, STCW reg. III/5. Sjóvinnustýrið hevur upplýst, at hetta samansetta førleikaprógv vanliga ikki verður ásett sum eitt krav í manningarskjølum. Í staðin verða hesi førleikakrøv til manningina ásett hvør sær, sum ein fulltikin dekkari STCW reg. II/5 og sum ein fulltikin motormaður STCW reg. III/5. Tað er í størstan mun førleikaprógv sum fulltikin dekkari STCW reg. II/5, sum verða kravd. Hetta er eisini orsøkin til, at stóri eftirspurningurin er á júst sjófólkum við hesum førleikaprógvi.

Hendan samansetingin í verandi útbúgving sum skipsatstøðari er ikki eitt krav í STCW-sáttmálanum fyri at lúka krøvini til at fáa førleikaprógvið sum fulltikin dekkari við handilsskipum til støddar omanfyri 500 BT, sum hevur átekningina STCW reg. II/5. Sambært STCW-sáttmálanum er tað nøktandi, at útbúgvingin, sum skal vera grundarlagið at skriva út førleikaprógv sum fulltikin dekkari, lýkur krøvini í STCW sec. A-II/5. Hetta merkir, at til ber at gera tillagingar í verandi útbúgving sum skipsatstøðari, sum í størri mun taka støði í STCW sec. A-II/5 burturav.

Uppskotið hjá bólkinum er, at skipsatstøðaraútbúgvingin framhaldandi skal fevna um allar teir partar av STCW-sáttmálanum, sum hon ger í dag. T.e. sum nevnt omanfyri:

- STCW sec. A-II/4 (Vaktarhaldsprógv til brúgvatænastu)
- STCW sec. A-II/5 (Fulltikin dekkari)
- STCW sec. A-III/4 (Vaktarhaldarhaldsprógv til maskintænastu)
- STCW sec. A-III/5 (Fulltikin motormaður)
- STCW sec. A-VI/1, grein 2 (Grundleggjandi trygdarskeið)

Tó verður skotið upp,  at verandi útbúgving verður býtt sundir í modul, so til ber at taka t.d. prógv sum fulltikin dekkari fyrst (STCW sec. II/5) í heysthálvuni. Her skal leggjast afturat, at eitt slíkt modul eisini hevði fevnt um STCW sec. II/4 – vaktarhaldsprógv til brúgvatænastu, grundað á, at hetta er eitt krav fyri at fáa sjálvt førleikaprógvið sum fulltikin dekkari. Til at fáa vaktarhaldsprógv, er tó eisini møguligt at fáa upplæring umborð (sí fylgiskjal 2).

Síðan ber til at taka restina av útbúgvingini sum fulltikin motormaður og vaktarhaldsprógv til maskintænastu í várhálvuni, tað vil siga STCW sec. A-III/5,  og STCW sec. A-III/4 (maskintænastu). Harafturat kemur grundleggjandi trygdarskeið, STCW sec. A-VI/1, grein 2. Eftir at hava tikið øll modulir í útbúgvingini, fara næmingarnir sostatt framhaldandi at hava lokið alt tað, sum skipsatstøðaraútbúgvingin í dag inniheldur. Tískil verður í fyrstu atløgu ikki mett neyðugt at broyta yvirskipaða heitið á fullu útbúgvingini, men í staðin at seta heiti á ymisku modulini.
Útbúgvingin sum skipsatstøðari kann í dag, sambært kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum í ávísan mun verða grundarlagið undir at stytta kravdu siglingartíðina fyri at fáa sjóvinnubræv sum brúgvayvirmaður, um umsøkjarar hava útbúgving sum skiparar ella skipsførarar. Við hesum uppskotinum verður mett, at hesar reglur kunnu varðveitast, tó at mett verður at neyðugt er at eftirmeta hetta.

## Uppskot til bygnað av útbúgving sum dekkari og skipsatstøðari

Arbeiðsbólkurin metti tað neyðugt at seta upp ítøkiliga við fakum, hvussu nýggi útbúgvingarleisturin kann vera. Lærarar og leiðsla á Sjónámi hava tí arbeitt saman við Undirvísingarstýrinum við einum uppskoti um, hvussu bygnaðurin á útbúgvingini kann vera gjørdur í mun til førleikamálini og ynskini fyri, hvat næmingarnir skulu kunna. Útbúgvingarleisturin er eisini í tráð við altjóða STCW krøv. Arbeiðsbólkurin er kunnaður um hendan útbúgvingarleistin og síðani eru broytingar gjørdar út frá viðmerkingunum, so at ein samlaður arbeiðsbólkur tekur undir við uppskotinum.

Niðanfyri er bygnaðurin settur upp av útbúgving sum dekkari og skipsatstøðari, soleiðis sum arbeiðsbólkurin skýtir upp.

| 1.kvartal | tímar | 2.kvartal | tímar | 3.kvartal | tímar | 4.kvartal | tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pr. Sjómansskapur | 60 | COX | 30 | Siglingarlæra | 40 | Siglingarlæra | 40 |
| Viðlíkahald | 60 | Roykkavara | 30 | Skipstøkni | 35 | Skipstøkni (havumhvørvi/marpol) | 35 |
| Sjótrygd og vernd (tr.skeið F) | 45 | Grunnleggjandi maskinlæra (ABC) | 36 | (havumhvørvi/marpol) | 10 | Veðurlæra | 10 |
| Brúgvavakt (nav/sjóreglur) | 9 | Reinføri | 15 | Veðurlæra | 15 | Siglingarreglur | 15 |
| Smiðjulæra (TSK) | 45 | ISPS | 15 | Siglingarreglur | 30 | Smiðjulæra (TSK) | 110 |
| Arbeiðstrygd | 18 | Tanker familiarisation | 15 | ROC | 110 | Maskinlæra (motorpassara) | 54 |
| Arbeiðsumhvørvi | 18 | Sjómansskapur (ABC- skipstøkni) | 27 | Smiðjlæra (TSK) | 54 | Hydraulikkur og køling | 45 |
| Grundleggjandi maskinlæra | 18 | Smiðjulæra (TSK) | 45 | Maskinlæra (motorpassara) | 45 | Arbeiðstrygd ( arb. Við Sea Healt | 18 |
| (ABC) | 18 | Arbeiðstrygd | 36 | Hydraulikkur og køling | | osv) | |
| Sjómansskapur (ABC- skipstøkni) | | Grunnleggjandi Hydraulik-køling | 27 | | | | |
| Grundleggjandi maritimt enskt | 18 | Havumhvørvisvernd | 9 | | | | |
| | | ROC | 30 | | | | |
| Tímar tils. | 318 | | 315 | | 309 | | 327 |

## Fráðgreiðing um bygnaðin

Fyrsta kvartal gongur frá uml. 1. sept. til umleið hálvan oktober, tá heystferian byrjar. Í omanfyri nevnda skema sæst, nær fakini liggja, og hvussu nógvir tímar tey vera mett til. Gev gætur, hetta er ein meting av tímatalinum, hvussu tað umleið verður. Her verður greitt frá fakinnihaldinum í 1. kvartalinum:

- ***Praktiskur sjómansskapur:*** Grundleggjandi sjómansskapur, har dentur verður lagdur á knútar, spleysingar, taljur og blokkar. Høvuðstilfarið er kapittul 1.1 - kapittul 1.4 í Søfartens ABC.
- ***Viðlíkahald:*** Royna ymiskt verkligt viðlíkahald, umframt ástøðiliga undirvísing við høvuðustilfarið úr kapittul 3 í Søfartens ABC.
- ***Sjótrygd og vernd (trygdarskeið F):*** Næmingarnir taka trygdarskeiði fyri sjófólk.
- ***Brúgvavakt (navigatión/sjóreglur):*** Undirvísing í skipan av brúgvavakt, og tí kravdu grundkunnleikum sum skulu til fyri at fáa vaktarhaldsprógv.
- ***Smiðjulæra (á Tekniska Skúla):*** Grundleggjandi nýtsla av amboðum og tólum, sum verða brúkt til m.a. dagligt viðlíkahald umborð.
- ***Arbeiðstrygd:*** Grundleggjandi undirvísing um arbeiðstrygd, og persónliga vernd/verndarútgerð. Høvuðstilfarið er kapittul 8.3 og úr kapittul 8.4 í Søfartens ABC.
- ***Arbeiðsumhvørvið:*** Dentur verður lagdur á hugburð til arbeiðstrygd, saman við kunning um lógir og Meddelelser A. Høvuðstilfarið er kapittul 8.1 og kapittul 8.2 í Søfartens ABC.
- ***Grundleggjandi maskinlæra (ABC):*** Grundleggjandi undirvísing um m.a. ventilar, kranar, pumpur, og líknandi tekniska útgerð umborð.
- ***Sjómansskapur (ABC- skipstøkni):*** Grundleggjandi vitan um skipatypur, bygnaðin og heitir í hesum sambandi, umframt skipalutir sum t.d. akker og róður. Høvuðstilfarið er kapittul 2 í Søfartens ABC.

Hetta er fakinnihaldið í 2. kvartali, sum gongur frá uml. hálvan okt. til próvtøkurnar móti jólum.

- ***COX:*** frálæra í brúki av bjargingarbáti eftir STCW A-VI/2-1 (prógv)
- ***Roykkavaraskeið:*** á Vinnuháskúlanum, Við Áir, sum lýkur átekning í STCW A-VI/1-2 (prógv)
- ***Grundleggjandi maskinlæra (ABC):*** Framhald av maskinlæruni frá 1.kvartal, har ið dentur verur lagdur á forbrenningsmotorin, køling, smyrjing og brennievni. (kap. 5.3 -5.4)
- ***Reinføri:*** Frálæra í reinføri, smb. krøvum frá Sjóvinnustýrinum og STCW um handfaring av matvørum umborð á skipum (prógv)
- ***ISPS:*** frálæra í ISPS-kotuni/verndaransni (prógv)

- ***Tanker familiarisation:*** Grundleggjandi undirvísing í kap 11 í Søfartens ABC, + annað viðkomandi tilfar
- ***Sjómansskapur (ABC- skipstøkni):*** framhald av kap. 2 í Søfartens ABC ´+ annað viðkomandi tilfar
- ***Smiðjulæra (TSK):*** framhald av nýtsla av amboðum og tólum, sveising, skering oa.
- ***Arbeiðstrygd:*** framhald av grundleggjandi undirvísing um persónliga vernd/verndarútgerð. kapittul 8.4 til 8.8 í Søfartens ABC

Ætlanin er somuleiðis at vitja virkir, knýtt at sjóvinnuni umframt á skipum, har næmingarnir síggja og læra beinleiðis um tað, sum er undirvíst í.
Tá næmingar hava fylgt undirvísingini í heysthálvuni, 1. og 2. kvartal, hava teir fakligu førleikarnar, sum kunnu geva teimum rættindi til at fáa førleikaprógv STCW sec. II/5 (dekkari) og STCW sec. II/4 (vaktarhaldsprógv til brúgvatænastu). Til at fáa vaktarhaldsprógv, er tó eisini møguligt at fáa upplæring umborð (sí fylgiskjal 2).
Skúlin í samráð við Undirvísingarstýrið hevur ábyrgdina av at endaliga leggja skema og implimentera nýggja útbúgvingarleistin, tá kunngerðararbeiðið og annað er klárt í mun til at fáa sett í verk.

## Førleikameting og modulbygnaðurin

Ein fyrimunir við nýggja útbúgvingarleistinum, sum er í modulum, er, at tað gerst lættari hjá skúlanum at førleikameta.
Fyri tað 1. kvartalið ber til at søkja um førleikameting hjá fólki, sum hava drúgvar royndir umborð á skipum (fiski- og handilsskipum) ella eina viðkomandi handverkaraútbúgving. Tað merkir, at sjófólk við royndum, sum verða mett at lúka treytirnar fyri førleikameting av 1. kvartali kunnu byrja beinleiðis á 2. kvartali og á jólum fáa prógv sum dekkarar. Inntil tað er nágreina, júst hvørjar handverkaraútbúgvingar eiga at telja við í førleikametingina, ger skúlin eina meting í hvørjum einstøkum føri. Til ber eisini til hjá royndum sjófólki at førleikametast í mun til hinar partarnar í útbúgvingini, og koma skjótari tann vegin, eins og tað hevur verið gjørt áður.
Legg eisini til merkis, sum nevnt áður, at her er talan um prógv fyri útbúgvingarpartin í mun til at gerast dekkari, síðani kemur siglingstíðin afturat fyri at gerast fulltikin dekkari.

Felagið fyri handilsskip hevur harumframt hesi uppskot í mun til at gera skúlagongdina so smidliga sum gjørligt hjá sjófólki í mun til heimaperiodur og modul:

- Partur av modulunum eitt nú kann skipast sum fjarlestur/sjálvlestur
- Partur av modulunum kann skipast sum upplæring umborð við útbúgvingarbók
- Býtast kann upp í enn smærri eindir/modul, ið kunnu takast yvir eitt nú fleiri heimaperiodur

Víðari arbeiðið og støðutakan til um og hvussu hetta kann gerast, verður aftaná tilmælið.

## Kunngerðarbroytingar

Neyðugt er at gera ymiskar broytingar í kunngerðum í samband við dekkaraútbúgvingina og nýggja útbúgvingarleistin. Her eru nakrar av broytingunum, sum arbeiðsbókurin ynskir at vísa á:

1. Heiti á ”Kunngerð nr. 88 frá 4. august 2014 um grundskeið í útbúgving til skipsatstøðara” verður brott til: ”Kunngerð nr. xx frá (dato) um útbúgving til fulltiknan dekkara”.
2. Tey støð, har tað í omanfyri nevndu kunngerð stendur ”skipsastøðari” verður broytt til ”fulltikin dekkari”.
3. Tey støð, har tað í nevndu kunngerð stendur ”grundskeið til skipsatstøðara” verður broytt til ”Skúlaskeið til fulltiknan dekkara”.
4. Heitið, ”Lýsing av innihaldinum í grundskeiðnum…”, verður broytt til ”Lýsing av innihaldinum í útbúgving til fulltiknan dekkara”.
5. Har tað standa ávís procent í ”Lýsing av innihaldinum”, hvussu nógv fakini fylla, verður tað strikað.
6. Heitið á ”Kunngerð nr. 121 frá 11. november 2015 um endaskeið í útbúgving til skipsatstøðara” verður broytt til ” ”Kunngerð nr. xx frá (dato) um útbúgving til skipsatstøðara”
7. Í mun til førleikameting, er neyðugt at staðfesta í kunngerð, hvørjar handverkaraútbúgvingar eiga at telja við.
8. Neyðugt er at meta um, hvørjar orðingar skulu vera í kunngerðum í mun til møguleikan við førleikameting og seta inn neyðugu orðingarnar.
9. Broytingar skulu gerast í kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum, soleiðis at krøvini um útbúgving til at fáa ymisku førleikaprógvini, serliga førleikaprógv sum fulltikin dekkari, samsvarar við broytta útbúgvingarleistin.
10. Útbúgving sum skipsatstøðari styttir kravið til siglingartíðina fyri at sleppa inn á skiparaútbúgvingina, og til at fáa ávís sjóvinnubrøv. Kannast skal í hvørjum kunngerðum hetta verður nevnt og, um møguligar tillagingar skulu gerast í kunngerðum grundað á broytta útbúgvingarleistin.

Legg til merkis, at tað kunnu vera aðrar broytingar, sum skulu gerast í kunngerðum í mun til broytta útbúgvingarleistin. Arbeiðsbólkurin mælir til at farið verður undir at gera arbeiðið liðugt í mun til kunngerðarbroytingar sum skjótast, aftaná at tilmælið er latið inn

## Kostnaðarmeting

Tað verður ikki mett, at hesar umleggingar fara at føra við sær stórvegis eykakostnað.

# Fylgiskjøl

## Fylgiskjal 1

”Kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum, sum broytt við kunngerð nr. 133 frá 21. september 2017”

“**§ 2.** Sjófólk, sum gera tænastu sum fulltikin dekkari, fulltikin motormaður og fulltikin skipsatstøðari við havfarandi handilsskipum til støddar 20 BT ella meira, skulu vera fylt 18 ár, hava galdandi heilsuváttan fyri sjófólk, og hava antin:

1) 18 mánaðir siglingartíð við havfarandi skipum til støddar 20 BT ella meira,
2) **staðið grundskeið sum skipsatstøðari** og 12 mánaðir siglingartíð við havfarandi skipum til støddar 20 BT ella meira, ella
3) **staðið skipsatstøðaraútbúgvingina** fyri persónar við sveinabrævi innan metal ella aðra viðkomandi yrkisútbúgving, og 12 mánaðir siglingartíð við havfarandi skipum til støddar 20 BT ella meira.

§ 3. Sjófólk, sum gera tænastu sum fulltikin dekkari ella fulltikin skipsatstøðari við havfarandi handilsskipum til støddar 500 BT ella meira, skulu innan 1. januar 2017 hava førleikaprógv sum **ávíkavist fulltikin dekkari ella fulltikin skipsatstøðari.**

*Stk. 2.* Sjófólk, sum gera tænastu sum fulltikin motormaður ella fulltikin skipsatstøðari við havfarandi handilsskipum við framtøkumegi á 750 kW ella meira, skulu innan 1. januar 2017 hava førleikaprógv sum ávikavist **fulltikin motormaður ella fulltikin skipsatstøðari**.

*Stk. 3.* Útlendsk sjófólk, sum gera tænastu sbrt. stk. 1 ella 2 við skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, kunnu hava førleikaprógv, sum er útgivið í heimlandinum.

*Førleikaprógv sum fulltikin dekkari við handilsskipum – STCW kap. II/5*

**§ 5.** Fyri at fáa førleikaprógv sum fulltikin dekkari krevst, at umsøkjarin er fyltur 18 ár og:

1) hevur heilsuváttan fyri sjófólk, galdandi fyri ta tænastu, førleikaprógvið gevur rætt til, og er skikkaður til kagtænastu,
2) lýkur treytirnar fyri at fáa vaktarhaldsprógv sbrt. STCW kap. II/4, og antin hevur staðið:
   a) **endaskeið sum skipsatstøðari** og hevur 18 mánaðir dekstænastu við havfarandi skipum til støddar 20 BT ella meira, ella
   b) **endaskeið sum skipsatstøðar**i og hevur 12 mánaðir dekstænastu við havfarandi skipum til støddar 20 BT ella meira og góðkenda útbúgvingarbók.

*Stk. 2.* 6 mánaðir av kravdu dekstænastuni sbrt. stk. 1, nr. 2 skulu vera við handilsskipum.

*Stk. 3.* Sjófólk, sum hava 12 mánaðir siglingartíð við havfarandi skipum sum fulltikin dekkari, millum 1. januar 2007 og 1. januar 2012, verða mett at lúka krøvini í stk. 1, nr.

## Fylgiskjal 2
Váttan um upplæring sambært STCW reg. II/4

Dagført / Revised 13.03.2022

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Váttan um upplæring sambært STCW reg. II/4
Documentation of Training in Accordance with STCW Reg. II/4

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Navn sjófólksins /** Name of Seafarer | | | | | |
| **P-tal /** Civic Reg. No. | | **Skipanavn /** Name of Ship | | **Kallimerki /** Call Sign | |
| **Navn á brúgvayvirmanni /** Name of Deck Officer | | | | | |
| **Sjóvinnubrævanummar hjá brúgvayvirmanni /** Deck Officer's Certificate No. | | | | | |

## Upplæring sambært STCW reg. II/4 / Training in accordance with STCW Reg. II/4

| | | Set X / Check |
|---|---|---|
| 1. | **Nýtsla av magnetkumpassi og gyrokumpassi /** Use of magnetic and gyro compasses | |
| 2. | **Róðursboð /** Helm orders | |
| 3. | **Skifti frá sjálvvirkandi stýring til handstýring og umvent /** Change-over from automatic pilot to hand steering and vice versa | |
| 4. | **Ábyrgd hjá tí, ið hevur kagtænastu, undir hesum fráboðan um peiling av ljóðsignali, ljósi ella øðrum objekti í stigum ella strikum /** Responsibilities of a look-out, including reporting the approximate bearing of a sound signal, light or other object in degrees or points | |
| 5. | **Skipsorð og allýsingar /** Shipboard terms and definitions | |
| 6. | **Nýtsla av hóskandi innanhýsis samskiftis- og ávaringarskipanum /** Use of appropriate internal communication and alarm systems | |
| 7. | **Førleiki at skilja boð og at samskifta við vakthavandi brúgvayvirmann um evni, ið viðvíkja kagtænastu /** Ability to understand orders and to communicate with the officer of the watch on matters relevant to watchkeeping duties | |
| 8. | **Mannagongdir fyri vaktarskifti og vaktarhald /** Procedures for the relief, maintenance and handover of a watch | |
| 9. | **Neyðugar upplýsingar fyri at halda trygga vakt /** Information required to maintain a safe watch | |
| 10. | **Grundleggjandi mannagongdir fyri umhvørvisvernd /** Basic environmental protection procedures | |
| 11. | **Kunnleiki til skyldur í neyðstøðum og ávaringarsignal /** Knowledge of emergency duties and alarm signals | |
| 12. | **Kunnleiki til ljós- og royksignal, fylgisveina-EPIRBar og SARTar /** Knowledge of pyrotechnic distress signals; satellite EPIRBs and SARTs | |
| 13. | **Fyribyrging av ósonnum neyðarkøllum og mannagongd tá neyðarkall tilvildarliga verður aktiverað /** Avoidance of false distress alerts and action to be taken in event of accidental activation | |

**Eg vátti hervið, at omanfyri nevnda sjófólkið er upplært sambært krøvunum í STCW reg. II/4. Samstundis vátti eg við undirskrift míni undir revsiábyrgd sambært § 163 í revsilógini, at omanfyri nevndu og hjásendu upplýsingar eru rættar /** I hereby confirm that the above-mentioned rating has successfully completed the training according to STCW reg. II/4. By signing this document, I also declare under penalty of section 163 of the Faroese Penal Code, that the information provided is correct

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Dagfesting /** Date | | **Navn við spjaldrastavum /** Name in Block Letters | |
| **Undirskrift og stempul skiparans /** Master's Signature and Stamp | | | |